TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ **26. mai 2011**	Blað nr.: **9046** Formansins merki:

GERÐABÓK

Dato: 26. mai 2011 kl. 16.30
Stað: Býráðssalurin
Málsnr:94/11-115/11

FUNDARLEIÐARI:
Heðin Mortensen

VIÐ LUTTØKU AV:
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal
Jógvan Arge
Maria H. Olsen
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Sjúrður Olsen

LUTTÓKU IKKI:
Jan Christiansen, ið hevði forfall

LUTTÓKU EISINI:
Bjørgfríð Ludvig
Jóan Petur Hentze
Heri Olsen

SKRIVARI:
Ingibjørg Berg

PROTOKOLLFØRARI:
Janus Isfeldt

MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 16.30

Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.

94/11 **<u>2011-0217</u>**

<u>Mál beind í nevndir</u>
Býráðið 26. mai 2011: Tikið til eftirtektar.

95/11 **<u>2009-0479</u>**

<u>Smábarnaskúlin til Sankta Frans skúla - innbúgv</u>

Lýsing av málinum - samandráttur
Í sambandi við bygging av nýggjum smábarnaskúla til Sankta Frans skúla vóru 5 veitarar bidnir um at geva tilboð uppá leyst innbúgv.

5 tilboð komu inn; Úrslitið var:
Allar upphæddir í kr., uttan mvg.

Veitari:	**Leyst innbúgv**
Eikin:	272.069,00
Blika:	277.188,00
Nema:	277.220,00
Byggitilfar:	284.580,00
Inventar tænastan:	335.695,00

Tilboðini eru gjøgnumgingin í bygginevndini, og í samráð við leiðslu skúlans og ráðgevan, mælir bygginevndin til at taka av tilboðnum frá Nema.

Talan er um eina heildarmeting, har støði er tikið í góðsku, prísi og útsjónd. Mett er, at góðskan og sniðið í tilboðnum frá Nema er tað, sum hóskar best til smábarnaskúlan. Hinvegin er prísmunurin millum tey lægstu tilboðini so lítil, at hann hevur ikki havt avgerandi týdning fyri valið av innbúgvi.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin taka undir við bygginevndini og mæla til at taka av tilboðnum frá Nema.

Mentamálanevndin 18. mai 2011: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 24. mai 2011: Ein meiriluti, Jákup Símun Simonsen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og taka av tilboðnum frá Nema.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen taka støðu á einum seinni fundi.

Býráðið 26. mai 2011: Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Vagnur Johannesen.

96/11 **2011-0877**

Boðanesheimið - alternativ orkuskipan.

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært byggiskránni fyri Boðanesheimið er dentur lagdur á at byggja ein sokallaðan lág-orku bygning smbr. orkuklassa 2 í BR-08, svarandi til eina árliga brutto orkunýtslu á 70 kWh fyri hvønn fermetur. Hettar merkir, at herd krøv eru til bæði tættleika og bjálving, umframt at "orkuramman" fyri bygningin skal prógvast í høvuðsprojektinum eftir nærri ásettum reglum.

Afturat hesum leggur byggiskráin upp til alternativa orkuútvinning smbr. pkt. 6.4.4:

"Grøn orkuveiting:

Umframt tilboði við oljufýrdum hitaverki, skal alternativt tilboð gevast við jarðhitapumpu at nøkta samlaða orkutørvin til upphiting og ventilering av bygningi, og upphiting av brúksvatni. Staðseting og tal av holum skal gerast í samráð við Jarðfeingið.

Uppskotið til grøna orkuveiting verður l□st við frágreiðing, principtekning og útrokning av COP-virði, árligari orkusparing og afturgjaldstíð av meirkostnaði."

Í vinnandi tilboðnum frá ArtiCon var alternativt roknað við at borað 25 hol niður á 200 m í økinum kring bygningin og kn□ta hesi í 4 hitapumpur. Fjarstøðan millum hesi hol er 40 m, svarandi til ein økistørv á uml. 30.000 fermetrar. Meiríløgan er um 1,7 mió.kr., árliga orkusparingin 16 kWh fyri fermeturin og afturgjaldstíðin um 15 ár við grundarlagi í verandi kostnaðarstøði.
Bygningurin er annars sera væl bjálvaður og í høvuðsheitum upphitaður við gólvhita í eini lágtemperatur-skipan (~55°), og sostatt sera væl egnaður til eina hitapumpuloysn.

Undir sáttmálasamráðingunum við ArtiCon í nov-des 2010 gjørdist greitt, at neyðugt var at leingja byggitíðina 2 til 3 mánaðir um jarðhitaskipan var vald, orsakað av nógvu holunum, ið skuldu borast í økinum kring bygningin. Kravið um tíðarleingjan, saman við óvissum um m.a. trygd fyri hita-veitingini, tá ongar royndir eru við jarðhita-skipan av slíkari støðd í Føroyum, førdi til, at avgerð varð tikin um at bíða við alternativari orku fyribils.
Síðan byggingin byrjaði hevur bygginevnd og umsiting, saman við arbeiðstakaranum kannað møguleikan fyri burðadyggari loysn í sambandi við eina hitapumpu-skipan, ið ikki nervar verandi bygging. Komið er fram til, at møguleikar eru eystanfyri vegin Yviri við Strond. Vansin er tó, at økið millum sjóvarmálan og vegin er fríøki/friðað øki, ið krevur serstakt loyvið við serstøkum atlitum í samband við inntriv í lendi. Eisini er økið beint yvirav Boðanesheiminum privat ogn, og verður tískil neyðugt at n□ta økið sunnanfyri, sum í løtuni verður n□tt til tjaldingarpláss.

Í sambandi við at farið verður yvir um vegin, hevur ein n□ggjur møguleiki stungið seg upp, nevniliga at n□ta sjóvarhita heldur enn jarðhita. Møguleikin er einastandandi, tí staðsetingin av bygninginum er so lágt og tætt at sjóvarmálanum. Fyrimunirnir við sjóvarhita fram um jarðhita eru, at økistørvurin er sera lítil, bert eitt lítið pumpuhús niðri við sjóvarmálan, og at tað slepst undan at órógva annað øki. Vansin er, at bert ein roynd higartil er gjørd í Føroyum við sjóvarhita, og ongar langtíðarroyndir eru. Tó skal viðmerkjast, at henda eina royndin, eftir ávísar tillagingar, vísur seg at verða sera væleydnað, og teknikkurin aftanfyri skipanina er sera líkur vanliga jarðhita-skipanini og sostatt ikki ókendur.
Bygginevndin hevur tikið avgerð um, at bygningurin ið best møguligan mun verður fyrireikaður til hitapumpuskipan, jarð- ella sjóvarhita, soleiðis, at leiðingar verða lagdar úr f□rrúmi oman til vegin, og pláss er tøkt í kjallara til hitapumpur, vatngoymslutangar o.a., sum krevst í hesum sambandi. Hesar fyrireikingar kosta undir kr. 20.000 at fremja nú og viðføra, at tað seinni slepst undan av grava økið upp inn undir bygningin og gera størri broytingar inni fyri munandi størri kostnað.
Hinvegin metir bygginevndin ikki tað verða hennara avgerð at taka støðu til, um stig skal takast til fult og heilt at fara frá ætlaða oljuf□rda hitaverkinum og yvir til eina hitapumpuskipan nú, og saknar einfalt eina politiska støðutakan til spurningin um "grøna orku" sum heild at styðjað seg til.
Verður avgerð tikin um at n□ta hitapumpuskipan nú, so kunnu ketlar, oljutangi og skorsteinur fyri uml. kr. 2-300.000,- sparast burtur, tó verður neyðugt við einari

eykajáttan á fyribils uml. 1,7 mió.kr. fyri sjálva hitapumpuskipanina, íroknað boran av holum ella pumpuhús.

Sosiala nevnd 3. mai 2011: Sosiala nevnd samtykti at mæla b□ráðnum um fíggjarnevndina, at taka avgerð um burturav at n□ta sjóvarhita sum orkuskipan til heimið og at fáa neyðuga fígging til vega.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og avgreiða spurningin um fígging, tá ið kanningararbeiðið er avgreitt.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt og at fíggja meirkostnaðin innanfyri verandi karmar.

97/11 **<u>2011-0604 HSE</u>**

<u>Viðvíkjandi útstykking á Lygnnesi í Kollafirði</u>

Lýsing av málinum - samandráttur:
Umsitingin hevur arbeitt við at útstykkja kommunalu ognina, matr. nr. 203c í Kollafirði. Fyri at fáa eina so góða útstykking sum til ber, er uppskot til útstykkingarætlan gjørd í samráð við grannar til kommunalu ognina, matr. nr. 209, 308 og 309 í Kollafirði.
Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m^2 til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.
Neyðugt verður at gera ein 8 m breiðan veg, sum verður 74 m langur við einari gongubreyt frá núverandi vegi á Lygnnesi.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Upplýsingar frá umsitingini:
Matr. nr. 203c er 6.563 m^2 til víddar.Eigari:Tórshavnar kommuna
Matr. nr. 209 er 975 m^2 til víddar. Eigari: Dania Dam
Matr. nr. 308 er 1.548 m^2 til víddar. Eigari: Jógvan Dam
Matr. nr. 309 er 1.840 m^2 til víddar. Eigari: Jens Andreas Dam.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

Fíggjarligt:

Kommunan hevur biðið Una Patursson, verkfrøðing um eina kostnaðarmeting av vegnum og er upphæddin uml. 2 mió. kr. Tá er projektering, eftirlit og byggileiðsla við, men ikki mvg.
Kommunan má leggja út fyri arbeiðini, ið verður afturgoldið tá stykkini eru seld.

Viðmerkingar frá Teknisku deild:

Skjøl:
2011-0604

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til, at umsitingin, í samráð við grannarnar ger serstaka byggisamtykt fyri økið, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina við atliti til fígging av ávegis kostnaðinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti:
Kommunan hevur í samráð við eigarnar gjørt uppskot um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309. Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m² til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309 á Lygnnesi í Kollafirði.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

98/11 **<u>2010-1277</u>**

<u>Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1225 við Marknagilsvegin hjá Finnboga Arge.</u>

Finnbogi Arge søkir um loyvi at útstykkja trøðna, matr. nr. 1225 við Marknagilsvegin. Ætlanin umfatar 13 grundstykkir, sum verða uml. 430-450 m2 til víddar og eitt sum verður 970 m2 til víddar. Vegatkoma til øll grundstykkini verður frá Kongsgil. Fríøkið verður ovast í útstykkingini.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í umráðisparti A 1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Upplýsingar frá umsitingini:
Trøðin, matr. nr. 1225 er 11.440 m2 til víddar, harav er uml. 740 m2 vegur (Marknagilsvegurin). Útstykkingin hevur verið til viðgerðar í teknisku nevnd, har avgerð var tikin, at øll grundstykkini á matr. nr. 1225 skulu hava vegatkomu frá Kongsgil. Hetta merkir, at veghallið á útstykkingarvegnum verður í hægra lagi.

Frávik:
Útstykkingin umfatar eitt øki, sum í núverandi byggisamtykt liggur í 4. grundumráði. Kommunan hevur samtykt av broyta byggisamtyktina, soleiðis at økið kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. Grundumráði.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

Fíggjarligt:
Ongar fyri TK

Viðmerkingar frá øðrum deildum:
Málið er avgreitt í samráð við b□arverkfrøðingin, sí hjálagda teldupost.

Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:

Skjøl:
Umsókn og tekningar, j.nr 2010-1277/24
Teldupostur frá b□arverkfrøðinginum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt, treytað av at byggisamtyktin verður broytt soleiðis at økið sum í dag liggur í 4. grundumráði kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. grundumráði.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Atkvøtt varð um tilmæli frá Jákup Símun Simonsen, um at beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina og teknisku nevnd, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Fr□dal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen

- Nú fór Sjúrður Olsen

99/11 **2011-0977**

Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1227a og 1228a við Oyggjarvegin.

Lýsing av málinum - samandráttur:
Verkfrøðingastovan søkir um loyvi at útstykkja grannaognirnar, matr. nr. 1227a og 1228a, sum liggja millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin. Kommunan hevur í samráð við umsøkjaran gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í umráðisparti A 1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Upplýsingar frá umsitingini:
Matr. nr. 1227a er 6.341 m^2 til víddar, og matr. nr. 1228a er 9.055 m^2 til víddar, tilsamans 15.396 m^2. Fríøkið verður 1.070 m^2 til víddar, felags p-pláss verða 12 stk. og talið av grundstykkjum verða 22 stk. Grundstykkini verða millum 402 m^2 og 611m^2
Vegatkoma verður frá Hjaltarók, og hædd er tikin fyri at samanbinda útstykkingarvegin við Tummasargøtu. Ein ál á 8 m verður avsett til vegatkomu til grannatrøðna, matr. nr. 1226a.

Frávik:
Útstykkingin umfatar eitt øki, sum í núverandi byggisamtykt liggur í 4. grundumráði. Kommunan hevur samtykt at broyta byggisamtyktina, soleiðis at økið kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. grundumráði.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

Fíggjarligt:
Ongar fyri TK

Viðmerkingar frá øðrum deildum:
Tekniska deild

Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:

Skjøl:
Umsókn og tekningar, j.nr 2011-0997/1

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt, treytað av at byggisamtyktin verður broytt soleiðis at økið sum í dag liggur í 4. grundumráði kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. grundumráði.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt at beina málið í byggi- og b□arskipanar-nevndina og teknisku nevnd.

- Nú fór Jákup Símun Simonsen

100/11 **<u>2011-1085 KF</u>**

<u>Uppskot til víðkan av 2. grundumráði við Bøgøtu.</u>

Lýsing av málinum, samandráttur.
Kortskjalið til almennu byggisamtyktina er uppbygt soleiðis at 1. grundumráði er b□arkjarnan (millum Bringsnagøtu, Kongagøtu, Tinghúsvegin og Tórsgøtu). 2.

grundumráði eru gamlir b□arpartar í miðb□num (Reyn, framvið Jónas Broncks gøtu, niðan til Kommunuskúlan og Sjónleikarhúsið og út á Skálatrøð) og 3. grundumráði, sum er deilt í ymiskar umráðispartar, er restin av b□num, sum er skipaður.

Í vestara parti av miðb□num gongur eitt innvik, av 3. grundumráði, inn til Tróndargøtu, soleiðis at størsti parturin av Bøgøtu liggur í A1-øki í 3. grundumráði.

Í Bøgøtu eru fleiri handlar í dag og kommunan hevur eisini fingið fleiri áheitanir um at betra um umstøðurnar fyri handilslívið her.

Sæð frá einum b□arskipanarligum sjónarmiði, er tað eisini umráðandi at skapa góðar umstøður til handisvirksemi í Bøgøtu vísandi til, at hetta er gongu sambandið millum parkeringsøkið á Skálatrøð og handilsgøtuna Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu.

Við at broyta byggisamtyktina soleiðis at hetta økið verður 2. grundumráði, kundu umstøðurnar fyri fleiri av teimum handlandi verið betraðar.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagfest. 19. apríl 2011.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

- Nú fór Levi Mørk

101/11 **<u>2006-0531</u>**

<u>Umsókn um broyting av útstykking á Dánjalstrøð, matr.nr. 1171b, v.m., Tórshavn.</u>

Lýsing av málinum, samandráttur.

Eigarin av Dánjalstrøð, Heðin Samuelsen ynskir at útstykkja fleiri grundøki á trøðni. Í hesum sambandi ger hann vart við óvanliga framferð í sambandi við frílendi á hansara ogn.

Lógir og ásetingar:
Ognin liggur í umráðispartinum A1 lág sethúsabygging og D1frílendi.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

Fíggjarligt:
Tórshavnar kommuna rindar fyri projektering av høvuðsvegi.

Skjøl:
Áheitan um alment innlit j. nr. 2006-0531/1.

Tilmæli:
B□ararkitekturin mælir til at umsitingin saman við eigaranum ger eitt uppskot til útstykkingarætlan, og at senda uppskotið til útstykkingarætlan til kunningar í grannalagnum. Útstykkingarætlanin verður tengd at innkoyring til punkthúsini í A2 økinum sunnanfyri.

Harumframt verður mælt til, at D1 parturin av trøðni verður broyttur sambært hesi útstykkingarætlan.

Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Lýsing av málinum, samandráttur.
Eigarin av Dánjalstrøð, Heðin Samuelsen søkir um loyvi at broyta verandi útstykking við 11 grundøkjum til 21 grundøki.

Lógir og ásetingar:
Ognin liggur í umráðispartinum A1 og D1.

Upplýsingar frá fyrisitingini:
Ognin, matr.nr. 1171b, er 5356 m^2.

Útstykkjað verða 10 grundøki, vídd 564,525, 600, 536, 536, 536, 536, 536, 500 og 500 m^2.

Ábygd verða stakhús. Mest loyvda byggistig verður 0,3. Mest loyvda netton□tslustig verður 0,3.

Breidd av vegi: 8, kravd breidd av vegi er 8m.

Vídd á fríøki uml. 2000 m^2.

Tal av felags bilstøðlum 12 stk.

Viðmerkingar frá teknisku deild:
Tekniska deild hevur ikki viðgjørt umsóknina. Orsøkin er, at tilfarið ikki er nágreiniligt nokk, tó verður hall á vegi, breidd á vegi, gøtuljós og kloakkskipan viðgjørd í tekniska projektinum.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

Fíggjarligt:
Í sambandi við útstykkingarætlanina, verður neyðugt at dagføra skittvatnsleiðingina. Somuleiðis verður neyðugt at dagføra leiðingina til yvirflatuvatn.

Skjøl:
Umsókn j. nr. 2006-0531/1.
Tekningar j. nr. 2006-0531/2.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og b□ararkitekturin mæla til, at góðkenna útstykkingarætlanina skjal nr. 2006-0531/4 við teirri broyting at atkoma til stykkini nr. 2-10 verður frá verandi vendiplássi við matr.nr. 1171m, og at vendipláss min. 12x12 m verður gjørt við stykkini nr. 8 og 9. Tekniskt prosjekt skal lúka treytirnar sum tekniska umsitingin setur í samband við útstykkkarætlanina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 29. oktober 2007: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

-Umsøkjarin er komin við n□ggjum uppskoti. Uppskotið er í samsvari við treytirnar kommunan hevur sett. Tó er eitt av grundøkjunum minni enn 500 m^2.

Tilmæli:
Mælt verður til at góðkenna n□ggju útstykkingarætlanina treytað av at einki grundøki er minni enn 500 m^2 ’ og tað einans kunnu byggjast stakhús á útstykkingini.

Mælt verður til at biðja umsøkjaran senda inn rættaðar útstykkingarætlanir.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2008: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti:
Vísandi til at hetta málið ikki hevur fylgt teimum vanligu mannagongdunum fyri útstykkingarmál, hava ávísar misskiljingar tikið seg upp.

Tað vísir seg at umleið helmingurin av hesi útstykking liggur í D1-øki, har bústaðir ikki kunnu byggjast sambært almennu byggisamtyktini. Tí er neyðugt at broyta byggisamtyktina um útstykkingin skal kunna gjøgnumførast.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagfest. 6. apríl 2011.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

102/11 **<u>2009-1888</u>**

<u>Liðuggerð av uttanumøkjum á Jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini</u>

Kommunala brennistøðin fekk nýggja umhvørvisgóðkenning 29. mai 2008. So hvørt sum brennistøðin er víðkað og fleiri økir eru tikin í nýtslu, er góðkenningin víðkað til at umfata hesi økir.

Í góðkenningini eru settar treytir við m.a. liðuggerð av øllum brúksøkjum í sambandi við jarngoymsluna, so hvørt sum hesi eru atkomulig. Hetta fevnir um asfaltering ella stoyping av undirlagi á økjunum og dagføring av frárenningarskipanini og oljuskiljarum, umframt gerð av betongkanti, at halda møguligum lekum aftur á tangagoymsluni við evnum, ið verða tappaði av bilunum. Eisini skulu goymslurnar verjast móti regni og vindi. Sambært góðkenningini skuldu hesi viðurskifti verið fingin í rættlag 1. januar 2009.

Umhvørvisstovan var á fráboðaðari eftirlitsvitjan á brennistøðini 25. juni 2009. Eftirlitið varð framt við grundarlagi í umhvørvisgóðkenningini og treytunum í hesari.

Í sambandi við eftirlitsfrágreiðingina hevur kommunan fingið boð um at lúka treytirnar til brúksøkini beinanvegin ella í seinasta lagi 1. oktober 2009. Um ikki hetta er møguligt, verður kommunan biðin um at grundgeva fyri hesum.

Kommunan hevur 7. august 2009 sent Umhvørvisstovuni skriv, har boðað verður frá, at projekteringin av liðuggerðini av brúksøkjunum er sett í verk, og bíðað verður eftir kostnaðarmeting, fyri at viðgera málið politiskt. Í skrivinum verður biðið um, at onnur freist verður sett fyri liðuggerðini, tá projekteringin er komin longur ávegis, kostnaðarmeting er fingin og málið er viðgjørt politiskt.

Fyribils metingin av kostnaðinum fyri arbeiðið ljóðar á umleið 3,7 mió. kr. Hesa upphædd megnar brennistøðin ikki at bera av rakstrinum. Tí má íløgan antin fíggjast við eini eykajáttan ella flytast av aðrari játtan.

Íalt eru avsettar 8,025 mió. kr. á íløgujáttanini til renovatión í 2009, harav n□ttar eru 0,467 mió. kr, sostatt eru 7,557 mió. eftir av íløgujáttanini. Játtanin er til útreiðslur til projektering av tyrvingarplássinum á Glyvursnesi og byrjan av arbeiðinum, m.a. í sambandi við gerð av móttøkuplássi til spillivatnsevju. Av tí at nógv er liðið av árinum og ognarviðurskiftir ikki eru avgreidd enn, verður ikki roknað við at brúka stórvegis av játtanini til n□ggja tyrvingarplássið í ár.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til:
1. at prosjekt av liðugtgerð av uttanumøkjum á jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini, verður gjørt
2. at umsitingin fær heimild at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og
3. at upp til kr. 3,7 mió av samlaðu íløgujáttanini til renovatión í 2009, verða játtaðar til útreiðslurnar av neyðugum arbeiðum, ið skulu gerast á Brennistøðini, fyri at lúka treytirnar frá Umhvørvisstovuni.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 9. september 2009: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 17. september 2009: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ískoyti:
Projekt og útbjóðingartilfar er liðugt.
Umsitingin greiðir frá

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til at góðkenna projektið og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. november 2009: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión millum 5 arbeiðstakarar. Licitatiónin var hildin 22. desember 2009 á skrivstovuni hjá LBF. Hesi tilboð komu inn:

- Andrias Berg kr. 3.904.550,-

- Articon kr. 3.976.940,58
- Maskinkoyring kr. 4.304.160,-
- J&K Petersen kr. 4.495.292,-
- Sp/F Plan kr. 4.954.135,-

Endaliga kostnaðarmetingin uppá arbeiðið ljóðaði uppá kr. 5.087.913,-.

Tilboðini eru eftirkannaði, og tað vísir seg, at roknifeilur er i tilboðnum hjá Andrias Berg, soleiðis, at ein postur á kr. 51.000,- ikki er komin við. Eisini er feilur í tilboðnum frá J&K Petersen, so at ein postur á kr. 145.430 er ikki komin við.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaður kostnaður av íløguni verður hesin:

Tilboð Andrias Berg:	kr	3.904.550
Ókent 10 % umleið	kr.	390.455
Projektering (uppgjørt)	kr.	322.146
Eftirlit (fastprís tilboð frá LBF)	kr.	230.000
Í alt u/MVG	kr.	4.847.151
MVG 6,25 %	Kr.	302.947
Í alt v/MVG	**kr.**	**5.150.098**
Játtað av íløgur 2009	kr.	3.700.000
At játtað av íløgum 2010	kr.	**1.450.098**

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:
1. At tikið verður av lægsta boðnum og gjørdur verður sáttmáli við Andrias Berg um arbeiðið.
2. At játtaðar verða kr. 1.450.000 av konto 7.30.42.111. Renovasjón (Løgujáttan)
3. At beina málið í b□ráðið umvegis fíggjarnevndina.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 18. januar 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í b□ráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 20. januar 2010: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 28. januar 2010: Einmælt samtykt.

Ískoyti:

Eftirmeting og fíggjarlig uppgerð:
Byggiarbeiðið er nú liðugt, burtursæð frá uppseting av veðurverju til tangagoymsluna, sum KB sjálvt ger.

Endaliga fíggjarliga uppgerðin er um at vera liðug. Fíggjarliga støðan í projektinum er hendan:

		Meting:	kostnaður (min.)	Kostn. (max.)	goldið higartil
Tilboð Andrias Berg:	kr	3.904.550	3.916.550	3.916.550	3.916.550
Frádrag væntandi KS			-75.805	0	-75.805
Ókent 10 % umleið	kr.	390.455	490.982	490.982	430.531
Projektering	kr.	322.146	317.236	317.236	317.236
Útbj./ eftirlit	kr.	230.000	281.066	281.066	237.316
Trygging			8.040	8.040	8.040
Í alt u/MVG	kr.	4.847.151	4.938.069	5.013.874	4.833.867
MVG 6,25 %	Kr.	302.947	308.127	312.865	301.614
Í alt v/MVG	**kr.**	**5.150.098**	5.246.196	5.326.738	5.135.482
Játtað av íløgur 2009	kr.	3.700.000	3.700.000	3.700.000	3.700.000
Játtað av íløgum 2010	kr.	1.450.000	1.450.000	1.450.000	1.450.000
Játtan í alt	**kr.**	**5.150.000**	**5.150.000**	**5.150.000**	**5.150.000**
Eftir av játtan		-98	**-96.196**	**-176.738**	14.518

Frágreiðing til ymsu postarnar:

Frádrag vegna væntandi KS:
Eftirlitið hevur ikki móttikið nøktandi skjalprógv fyri ymsum pørtum av KS sambært projektinum, og hevur roknað seg fram til, at virðið av hesum manglandi er kr. 75.805,-. Um nøktandi skjalprógv sambært projektinum verður innlatið, skal hetta afturhald útgjaldast.

Ókent:
Undir byggifasuni eru staðfestar ymsar meir- og minniveitingar vegna broyttar nøgdir og smærri broytingar/umprojekteringar. Hesar broytingar eru avtalaðar við arbeiðstakaran á avtaluseðlum B1 og B4. Harumframt varð tangagoymslan umprojekterað, og av tí at semja ikki fekst við arbeiðstakaran hesum viðvíkjandi, varð hesin postur tikin burtur úr tilboðnum, og í staðin bleiv tilfarið innkeypt separat, sum KB síðani skal uppseta.
Eitt eyka krav uppá asfalteringsarbeiðið kom heldur seint í málsgongdini. Uppmátingin hjá arbeiðstakaranum vísti, at asfalteraða økið varð nakað størri enn økið sambært tilboðslistanum, og hevur arbeiðstakarin tískil krav uppá gjald fyri tað. Yvirlit yvir postin ókent er niðanfyri:

Meir- og minniveit. Avtaluseðlar			
Avtaluseðil B1, dagfestur 28/9-2010	Kr	322.990	
Avtaluseðil B4, dagfestur14/01-2011	Kr	2.720	

Eykarokning asfaltering, dagfest 2/2-2011	Kr	75.935	
Meir og minniveiting í alt	Kr	**401.645**	**401.645**
Eyka til tangagoymslu (tikið úr tilboðnum)			
Stál frá Bladt til tangagoymslu	Kr	28.886	
Sinusplátur til tangagoymslu	Kr	11.421	
Rulluportur til tangagoymslu	Kr	49.030	
Tangagoymsla í alt	Kr	**89.337**	**89.337**
Meir-/minniveitingar og eyka til tangagoymslu í alt	kr		**490.982**

Ráðgeving (eftirlit):
LBF gav TK eitt fastprís-tilboð uppá útbjóðing og eftirlit. Tilboðið varð grundað á eina byggitíð uppá í mesta lagi 18 vikur. Arbeiðið tók tó longri tíð enn 18 vikur, og hevur LBF boðað frá, at teirra meirútreiðslur eru umleið 87.500, serliga vegna projektbroytingar av tangagoymsluni og forlongda byggitíð. Leiðarin á KB hevur gjørt avtalu og semju við LBF um, at meirkostnaðurin til ráðgeving/eftirlit verður b□ttur í helvt millum byggiharran og LBF, treytað av góðkenning av nevnd.

Fíggjartørvur:
Neyðugt er við eini eykajáttan á millum kr. 96.196 og kr. 176.738, alt eftir hvussu stórur partur av írestandi KS-arbeiðnum verður latið inn av arbeiðstakaranum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðari fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at meirkostnaðurin verður fíggjaður av høvuðskonto 7175, við at flyting av í mesta lagi kr. 176.738,- verður gjørd frá verkætlan L71001 (Tyrvingarplássið á Glyvursnesi) til verkætlan L71002 (Jarnmóttøkuplássið).

Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

- Nú fór Jógvan Arge

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ 26. mai 2011	Blað nr.: **9063** Formansins merki:

103/11 **2011-0958**

Uppskot til broytt gjøld fyri pappír og papp og úrslitaleysar tømingar av bingjum

Uppskot:
- Broytt gjøld fyri pappír og papp
- Gjald fyri úrslitaleysar tømingaroyndir av bingjum (bl. pappír/papp og húsarhaldsrusk)

Vísandi til, at IRF hevur lækkað gjaldið fyri móttøku av pappíri og pappi, sum Kommunala Brennistøðin letur til endurnýtslu hjá IRF, mælir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini til at gjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini fyri heinting og innlating av pappíri og pappi verða broytt samsvarandi talvuni niðanfyri (allir prísir eru uttan MVG):

Vøra	Gjald nú	Inntøka 2010	Kostn. IRF	Kostn. Flutn.	Mvg tap 6,25%	kostn. Í alt	Uppskot Nýtt gjald
	kr/m^3	kr	kr/m^3	kr/m^3	kr/m^3	kr/m^3	kr/m^3
Bl. pappír / papp innsavnað	140 (u/mvg)	16.016	55 (u/mvg)	11,6 (u/mvg)	4,2	71 (u/mvg)	72 (u/mvg)
Pappír ella papp Endurnýtslan	60 (u/mvg)	122.328	10 (u/mvg)	13 (u/mvg)	1,5	25 (u/mvg)	32 (u/mvg)

Tilmæli:
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at
- Broyta gjaldið fyri innsavning av blandaðum pappíri og pappi frá 140 kr/m^3 u/mvg til 72 kr/m^3 u/mvg
- Broyta gjaldið fyri innlating á Endurnýtsluna av pappíri ávíkavist pappi frá 60 kr/m^3 u/mvg til 32 kr/m^3 u/mvg
- At áseta eitt gjald fyri úrslitaleysar tømingaroyndir av bingjum til bl. pappír/papp og húsarhaldsrusk á 24 kr. fyri vanligar bingjur (upp til 1,2 m^3) og 48 kr. fyri størri bingjur.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

- Nú kom Jákup Símun Simonsen

104/11 **<u>2011-0943</u>**

<u>Uppskot um broyting í gjøldum á tyrvingarplássinum í Húsahaganum</u>

Leiðarin á kommunalu Brennistøðini mælir til, at niðanfyri nevndu gjøld á tyrvingarplássinum í Húsahaganum verða broytt soleiðis:

Vørunr.	Heiti	Gjald nú	Gjald broytast til	Nøgd 2010	Innt. 2010
15070	Móttøka av mold	16 kr/m^3 (u/mvg)	8 kr/m3 (u/mvg)	3050 m^3.	Kr. 48.800
15076	Søla av grót	60 kr/m^3 (u/mvg)	120 kr/m3 (u/mvg)	0	0

Viðmerkingar:

<u>Móttøka av mold:</u>
Síðani tyrvingarplássið fekk sáldiskuffuna til mold á heysti 2009 (mál 2009-1546), er eftirspurningurin eftir skildari mold vaksin so líðandi. Nú verður mett, at eftirspurningurin er eins stórur ella størri, enn til ber at nøkta við verandi nøgd av mold, sum kemur inn á plássið og sum er egnað at sálda og selja. Fyri at nøkta vaksandi eftirspurningin, er ynskiligt er tí at fáa meiri av góðari mold inn á plássið.

Verandi gjøld fyri móttøku av avgrevstri eru eins fyri mold, eyr, leir og grót (16 kr/m^3 u/mvg), og er tilfarið samanblandað, er gjaldið 48 kr/m^3. Hóast henda prísmun millum reint tilfar og blandað tilfar, má tað staðfestast, at tað ikki er nóg stórur áhugi at lata inn góða mold, ið er nóg rein og harvið egnað at skilja og selja aftur.

Mett verður, at við at seta gjaldið niður fyri góða mold, ið er egnað at sálda og selja, ber til at fáa meiri av tílíkari mold inn, tí lægra gjaldið eggjar arbeiðstakarum til at gera sær størri ómak at skilja hana frá øðrum avgrevstri.

<u>Søla av gróti:</u>
Eftirspurningur er eisini eftir grótinum, sum verður skilt frá moldini í n□ggju sáldiskuffuni. Árini frammanundan hevur ikki verið selt nakað serligt av gróti (undir 10 m^3 um árið seinastu 10 árini), og gjaldið hevur eisini verið óbroytt øll árini. Nú tá eftirspurningur er eftir grótinum, verður mett, at gjaldið eigur at dagførast eisini.

Tilmæli:

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at

- gjaldið fyri móttøku av góðari mold, ið er egnað at sálda og selja, verður broytt frá 16 kr/m^3 til 8 kr/m^3 u/mvg.
- gjaldið fyri sølu av gróti verður broytt frá 60 kr/m^3 til 120 kr/m^3.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

- Nú komu Jógvan Arge og Levi Mørk

105/11 **<u>2011-0911</u>**

<u>Viðvíkjandi gjald fyri jarnskrott</u>

Síðani 2006 hevur tað verið ókeypis fyri vinnukundar at sleppa av við jarnskrott á kommunalu Brennistøðini. Frammanundan var gjaldið 72 kr u/mvg pr. m^3.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir, at tíðin nú er komin til, at innlatarin (vinnukundin) fær eitt eitt gjald fyri at innlata jarnskrott á Kommunalu Brennistøðina.

Við at lata eitt gjald fyri jarnskrott, metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at tað eggjar borgarum og vinnuni at skilja jarnið betri frá øðrum burturkasti, sum skal brennast ella tyrvast, umfamt at meiri jarnskrott verður innsavnað og innlatið til viðgerðar yvirhøvur.

Fyrimunir við at meiri jarn verður skilt frá og endurnýtt:

<u>A. Minka um CO2 útlát við øktari endurnýtslu:</u>
At endurnýta jarnskrott er ein stórur umhvørvisfyrimunur, í mun til at tað fer gjøgnum ovnin ella verður tyrvt. Endurnýtsla av einum tonsi av jarni sparir globalt sæð umleið 1,6 tons CO2 útlát.

At endurn□ta jarnskrott er í samsvar við raðfestingina fyri viðgerð av burturkasti (minka - endurn□ta beinleiðis - endurn□ta óbeinleiðis - brenna - tyrva).

<u>B. Náttuvernd</u>
Jarnskrott liggur ymsa staðni og sløðist, bæði úti í náttúruni, á almennum og privatum økjum. At fáa eitt gjald eggjar borgarum og vinnu at lata hetta inn til endurn□tslu.

<u>C. Verja ovnin móti jarni:</u>
Jarn í burturkasti at brenna kann geva tekniskar trupulleikar í ovni og ilskuskipan, og eigur tískil at minkast mest møguligt. Ov nógv jarn er í burturkastinum, sum verður latið at brenna.

<u>D. Minka um plásstørv á tyrvingarplássinum.</u>
Jarn í ilskuni verður tyrvt saman við ilskuni á tyrvingarplássinum. Jarnið í ilskuni upptekur sostatt óneyðugt og d□rabart pláss í tyrvingini.

Onnur atlit, sum eisini gera tað neyðugt at lata gjald fyri jarnskrott:

<u>E. Gjaldspolitikkurin</u>
Marknaðarprísurin fyri sølu av jarnskrotti hevur verið rættiliga góður og støðugur seinasta árið, og samsvarandi hvíla-í-sær-sjálvum meginregluni" og "líkskaparmeginregluni" í gjaldspolitikkinum merkir hetta, at partur av ágóðanum, sum er omanfyri útreiðslunum til handfaringina, eigur at koma kundanum til góðar.

<u>F. Eins tænasta frá KB sum kundar fáa frá øðrum veitarum</u>
Aðrir veitarar av tænastum innan endurn□tslu, herundir IRF, lata eitt gjald fyri jarnskrott, og fáa fáa hjá t.d. IRF tískil betri tænastu enn kundar hjá KB, og fyri at kunna veita líka góða tænastu sum aðrir veitarar, eigur KB eisini at lata eitt gjald

<u>G. Gagnn□ta kapacitet, íløgur og servitan best møguligt.</u>
Kommunan/KB hevur veitingarskyldu fyri móttøku og viðgerð av jarnskrotti, og í hesum sambandi eru gjørdar stórar íløgur í øki, maskinur og amboð, umframt at starvsfólk við servitan eru innan øki. Hetta eigur at verða gagnn□tt best møguligt, og tí er ynskiligt at fáa eina hampiliga stóra nøgd av jarnskrotti ígjøgnum skipanina, soleiðis at vitan og førleikar verður varðveitt.
Jarnplássið hjá KB hevur góðkenning og l□kur øll umhvørviskrøv, og tí er skilagott, at henda skipanin verður gagnn□tt av flest møguligum kundum, umhvørvinum at frama.

Marknaðarviðurskifti
Av tí at søluprísurin fyri jarnskrott kann sveiggja nakað, og viðhvørt skjótt, er neyðugt at hava eina skipan, sum ger tað møguligt við stuttum skotbrái at tillaga gjøldini til broyttar marknaðarstøður. Ein hóskandi skipan kundi tí verið, at b□ráðið heimilar kommununi at lata eitt gjald upp til t.d. 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons, og at leiðarin á KB kemur við uppskoti til gjald, sum

borgarstjórin/kommunstjórin síðani skal góðkenna, áðrenn tað verður kunngjørt á heimasíðuni.

Skjalprógv fyri innlatnum nøgdum:
KB hevur vigiskipan, har til ber at viga bilarnar, sum lata inn jarnskrott, fyri at skjalprógva nøgdirnar. Eitt ávíst mark eigur at verða ásett fyri eina minstu nøgd, sum til ber at fáa gjald fyri, t.d. umleið 200 ella 500 kg, annars verður tað ov nógv umsiting av smærri nøgdum.

Fíggjarlig viðurskifti:
Mett verður, at eitt gjald fer at viðføra øktar nøgdir av jarnskrotti, sum kann fíggja eitt gjald. Í 2011 er eisini tann serstøða, at inntøkan av seinastu lastini av jarnskrotti, sum bleiv seld um árskifti 2010/2011, er bókførd í 2011, og tískil er fíggjarliga "byrjunarstøðan" góð. Ein hampuliga stórur partur av jarnskrottinum, sum KB selur, kemur frá bilvrakum, sum eru móttikin sambært serligari skipan og tískil ikki fáa gjald.
Útgreining av fíggjarliga b□tinum á jarnplássinum er uppsett í serstøkum skjali (j.nr. 2011-0911/2).

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til:

- At b□ráðið heimilar umsitingini at lata gjald fyri jarnskrott, sum verður latið inn á Kommunalu Brennistøðina.
- Gjaldið kann vera upp til 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons.
- Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini kemur við uppskoti til gjald, sum borgarstjórin og kommunustjórin skulu góðkenna, áðrenn tað verður kunngjørt á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu
- Nøgdirnar av innlatnum jarnskrotti skulu skjalprógvast við vigiskipanini hjá Kommunalu Brennistøðini
- Minsta nøgd av jarnskrotti, sum gjald verður latið fyri, er 200 kg fyri hvørja viging.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2011: Nevndin samtykti at:

- B□ráðið heimilar umsitingini at lata gjald fyri jarnskrott, sum verður latið inn á Kommunalu Brennistøðina.
- Gjaldið kann vera upp til 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons.
- Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini ásetur gjaldið, sum verður kunngjørt á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.
- Nøgdirnar av innlatnum jarnskrotti skulu skjalprógvast við vigiskipanini hjá Kommunalu Brennistøðini
- Minsta nøgd av jarnskrotti, sum gjald verður latið fyri, er 200 kg fyri hvørja viging.

og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

106/11 **2005-2467/16 SG**

Innangarðsútskifting av Hest bygd

Lýsing av málinum - samandráttur:
Matrikulstovan fráboðar Tórshavnar kommunu í skrivi, dagfest 22. september 2005, at farið verður í gongd við innangarðsútskifting av Hest bygd.

Vanligt er at kommunur n□ta henda møguleika at ognartaka lendið til øll almenn endamál smb. § 22. Hetta er tí, at tað ognartikna lendið verður latið av øllum eigindómum, og endurgjaldið verður latið yvir útskiftingarroknskapin.

Tilmæli:
B□ararkitekturin mælir til at kommunan fyribils ognartekur lendið sambært hjálagda korti, dagf. 1. nov. 2005, tíh.

Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 24. november 2005: Tikið av skrá.

Tilmæli:
B□ararkitekturin mælir til at Tórshavnar kommuna ognartekur omanfyrinevndu øki til sethúsabygging, og at málið verður lagt fyri hest- og koltursnevndina

Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005: Vísandi til at fundarfrásøgnin frá 7. november 2005 var skeivt skrivað, samtykti nevndin at beina málið í hest/koltursnevndina til ummælis.

Hest-koltursnevndin 1. februar 2006: Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá b□ararkitektinum.

Eisini verður mælt til, at Tórshavnar kommunan ognartekur lendið millum vegin og havnaøkið.

Fíggjarnevndin 15. mars 2006: Samtykt at beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006: Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 18. apríl 2006: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Býráðið 27. apríl 2006: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ískoyti:
Matrikulstovan hevur nú gjørt eitt fyribils uppskot til innangarðsútskifting av Hest bygd. Í hesum sambandi hevur borgarafundur verið, og partarnir hava havt møguleika til at mótmæla og koma við broytingaruppskotum, áðrenn tað endaliga uppskotið verður lagt fram.

Viðv. tí lendinum, sum kommunan ætlar at ognartaka, hava verið einkultar viðmerkingar. Tí verður skotið upp, at økini verða broytt sambært tilmælinum frá býararkitektinum.

Tilmæli:
Býararkitekturin mælir til, at:
1. øki 105 verður strikað, meðan øki 106 verður víðkað niðan til garðin, sum víst á viðlagda korti.
2. øki 104 er broytt, sum víst á viðlagda korti.
3. øki 103 er óbroytt.
4. økini 101 og 102 eru løgd saman og broytt soleiðis, at møguleiki er at gera "atgongd" til økini 103 og 104, uttan at fara inn í bygningarnar fram við núverandi gøtu. Viðmerkjast skal, at bygningurin, sum kemur at liggja í nýggja øki 102, er gamla elektrisitetsverkið.

Útskiftingin ætlar at halda tað ætlaða ognartiknað metið, soleiðis at fyribilsplanurin nærum kann nýtast sum endaligur planur.

Hest-koltursnevndin 27. september 2006: Nevndin tekur undir við býararkitektinum, tó má hædd takast fyri økið 102, sum má víðkast til eisini at fevna um fótbóltsvøll - sí tekning.

Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og hædd verður tikin fyri áheitanini frá staðbundnu nevndini.

Ískoyti:
Málið hevur ligið hjá Umhvørvisstovuni eina tíð, men er nú tikið uppaftur. Samráðingar hava verið við Umhvørvisstovuna-Matrikulstovuna tann 17. februar 2011, har avtalað varð, at tillaga økini til aktuella tørvin. 1. mars 2011 kom endurskoðað uppskot til ognartøku frá Matrikulstovuni, og mælir umsitingin og býararkitekturin nevndini til at taka undir við hesum fyribilsuppskotinum. Tá fyribilsuppskotið er staðfest, og møguligar smærri tillagingar gjørdar, verður ein

endalig fullfíggjað ognartøkusamtykt løgd fyri b□ráðið, umvegis avvarðandi nevndir.
Fíggjarlig binding fyri kommununa verður uml. 40 kr/m²x 6.135 m² = 245.400 kr. íroknað er tá endurgjald fyri mist bitrættindi á kr. 4,80/m².

Sí hjáløgdu kortskjøl:
Skriv um ognartøku 1.02.2011
Listi yvir eigarar og broytt ognarviðurskifti
Kortuppdráttur av uppskoti

Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Býráðið 14. apríl 2011: Tikið av skrá.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við byggi- og b□arskipanarnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

107/11 **2011-0662/4 SG**

Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunust□rið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 16. mars 2011: Framlagt og góðkent.

Býráðið 24. mars 2011: Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 6. apríl 2011: Framlagt og góðkent.

Býráðið 14. apríl 2011: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

108/11 **2011-1139**

Ársroknskapurin fyri 2010 hjá Tórshavnar kommunu

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Framlagt.

Fíggjarnevndin 24. mai 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin fyri 2010. Grannskoðarafrágreiðingin verður løgd fyri býráðið.

Samtykt at mæla býráðnum til at afturvelja Spekt sum grannskoðara.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt góðkendur og at velja Spekt sum grannskoðara.

109/11 **2011-1131**

Uppskot til roknskapin 2010 hjá Tórshavnar havn

Havnarnevndin 4. mai 2011: Góðkent og samtykt at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at góðkenna roknskapin.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt góðkendur.

110/11 **2011-1132**

Grannskoðanarfrágreiðingin 2010 hjá Tórshavnar havn

Havnarnevndin 4. mai 2011: Framlagt. Samtykt at leggja grannskoðanar frágreiðingina fyri b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Framlagt.

Býráðið 26. mai 2011: Framlagt.

111/11 **2011-1093**

Framfluttar játtanir.

Yvirlit yvir gjørdar íløgur Tórshavnar havn í 2009 vísir, at tað kunnu framflytast t.kr. 17.262 netto til 2011, soleiðis at

t.kr. 12.262 verða fluttar til íløgur í Tórshavnar havn 2011 og
t.kr. 5.000 verða fluttar til umsiting av húsum í rakstri fyri Tórshavnar havn 2011.

Hesar skulu játtast av b□ráðnum sum eyka játtan. T.v.s við tveimum viðgerðuum.

Havnarnevndin 26. apríl 2011: Samtykt

Fíggjarnevndin 28. apríl 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við havnarnevndini, soleiðis at

t.kr. 12.262 verða fluttar til íløgur í Tórshavnar havn 2011 og t.kr. 5.000 verða fluttar til umsiting av húsum í rakstri fyri Tórshavnar havn 2011.

Býráðið 28. apríl 2011: Einmælt samtykt.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

112/11 **2008-3944 - RFP (sí eisini mál nr 2011-1045)**

Kloakk fram við Hoydalsá, stig 1

Lýsing av málinum – samandráttur:

Vísandi til ætlanina fyri kloakkarbeiði í 2008, er ætlanin at fara undir ovara partin á stig 1, ið umfatar kloakkina frá Petur Nolsøe og oman til Vegin Langa.

Biðið verður um at Sp/f Matin E. Leo, sum hevur gjørt kanningararbeiðið og skitsuprojekt, heldur fram við projektering og útbjóðing av nevnda arbeiði. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión í oktober 2008.

Fíggjarviðurskifti:
Sambært fíggjarætlan fyri kloakkarbeiði í 2008 eru avsettar kr. 2.800.000,- til nevnda arbeiði. Umsitingin hevur saman við ráðgeva lati gera eina kostnaðarmeting 2008-3944/2. Kostnaðurin fyri kloakk arbeiðið er innan ásettu fíggjarkarmarnar.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað verður kr. 400.000,- til projektering og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Tekniska nevnd 18. september 2008: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 8. oktober 2008: Samtykt at mæla b□ráðnum at taka undir við teknsiku nevnd, peningur til projektering verður lagdur út av teknisku umsitingini av øðrum projektum og endaliga samtykt í 2009.

Býráðið 20. oktober 2008: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ískoyti:
Projekt, ið er gjørt fyri alt økið kring Hoydalsá sambært b□ráðssamtykt 20. oktober 2008, er nú klárt til útbjóðing. Í sambandi við at hetta projektið umfatar allar dálkingarkeldur fram við Hoydalsá, eru eisini tey summarhús, ið ikki hava byggiloyvi til heilársbúk fevnd av projektinum. Spurningurin um kommunan við at leggja kloakkleiðing til nevndu summarhús fer at legalisera ólógliga bygging í økinum fram við Hoydalsá er reistur og støða skal tí takast til um kloakkarbeiðið bert skal umfata dálkingarkeldur, ið standast av lógligari bygging ella um allar dálkingarkeldur yvirhøvur sambært ásetingum í galdandi umhvørvisreglum skulu veitast í skipaða kloakk.

Víst verður í hesum sambandi m.a. til kunngerð nr. 53. frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, kap. 7, §19, ið ásetir, at: .. '*Einki, ið kann dálka vatnið, má verða leitt í áir, løkir, vøtn, strond ella føroyskt sjóøki ella goymast so nær teimum, at vandi er fyri at tað kann skolast út í tey'.*

Víst verður eisini á §21, ið ásetir, at ..'*Ikki er loyvt at leiða spillivatn úr rottanga ella reinsiverki út í opna veit ella rennu nær almennum fjølgongdum vegi. Spillvatnið skal ganga í lokaðum rør, annaðhvørt beinleiðis á sjógv eftir loyvi frá bý- ella bygdarráð, sum skal vera í samsvari við herildarætlanina eftir §18 í løgtingslóg um umvhørvisvernd, ella í eina spillivatnsleiðing, sum bý- ella bygdarráð hevur góðkent....'*

Víðari í somu grein verður ásett, í stk 2, at '*..Hevur bý- ella bygdarráð lagt ella fer tað at leggja spillvatnsleiðng, hava eigarar av lendi, sum liggur nærhendis, fyri egna rokning skyldu til at leiða egið spillivatn til felags spillivatnsleiðingina, og kann bý- ella bygdarráð áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.*

Umsitingin hevur tískil latið gera alternativt uppskot, ið 'bert' tekur atlit at kn□ta tað 'lógliga' virksemið til kloakkskipanina.

Teknisku faknevndirnar mugu tí taka støðu til tann prinsippiella partin í málinum – um

1. farast skal víðari við upprunaliga projektinum, ið tekur atlit til at reinska alla Hoydalsá.

ella um

2. farast skal undir at arbeiða við eini projekti, sum einans tekur hædd fyri teimum dálkingarkeldum, ið standast av lógligari bygging í økinum kring Hoydalsá.

Fíggjarlig viðvurskifti:
Sambært metingum frá ráðgeva hevur umsitingin mett um kostnaðin fyri omanfyri nevndu projekt. Samlaða kostnaðarmeting fyri upprunaliga projektinum er uml. kr. 3.222.590,00 (sí skjal nr. 2008-3944/4) meðan samlaða kostnaðarmetingin fyri alternativa projekti er uml. 2.337.846,- kr. (sí skjal nr. 2008-3944/5). Sambært skjali nr. 2009-2360/6 eru uml. kr. 7,8 mió. kr. tøkar til kloakkverkætlanir.

Ískoyti:
Í samband við kloakkætlan b□ráðsins, sum tað hevur verið arbeitt miðvíst við nú í nøkur ár, hava nakrir prinsipiellir spurningar tikið seg upp í samband við j. nr. 2008-3944 – Kloakk fram við Hoydalsá, stig 1. Hesir eru viðgjørdir á felagsfundi millum umsitingina og formannskapin í byggi- og b□arskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Løgdeildin hevur gjørt løgfrøðiligt upprit við støðið í spurningum í notati frá 11.01.11 frá teknisku umsitingini um viðurskiftini viðv. Niðurstøðan í løgfrøðiliga uppritinum er, at bygging, ið útleiðir spillivatn, skal burturleiðast sambært kommunalu spillivatnsætlanini – líkamikið hvørt talan er um lógliga ella ólógliga bygging. Tað kann ikki metast sum legaliserandi av ólógligari bygging, um spillivatn frá hesari bygging verður íbundið spillivatnsskipan. Kommunan eigur at halda tingini sundur, soleiðis, at spillivatnstrupulleikarnir verða handhevjaðir eftir lógarverki viðv. umhvørvis- og spillivatni og ikki lógarásetingum í tilkn□ti til hvørt bygging er lóglig ella ikki.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at fara undir arbeiði sambært upprunaliga prosjektinum, og at beina málið um fíggjarnevndina í b□ráðið at játta 3,3 mió kr.av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2011 (j. nr 2009-0427). Somuleiðis verður mælt til at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

Tekniska nevnd 10. mars 2011: Ein meiriluti: Marin Katrina Fr□dal, Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen, samtykti at taka undir við alternativa uppskotinum, ið var mett til uml. 2.337.846,- kr. (smb. skjal nr. 2008-3944/5) og at beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Somuleiðis samtykti merilutin at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

Ein samd nevnd samtykti eisini at heita á byggi- og b□arskipanarnevndina um at taka støðu til tað virksemi i økinum, ið ikki l□kur treytirnar í byggisamtyktini.

Samtykt var eisini at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina til kunningar.

Fíggjarnevndin 16. mars 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og játta kr. 2.337.846 av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2011.

Býráðið 24. mars 2011: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Lisitatiónin varð hildin hjá P/F Martin E. Leo 12. apríl 2011, kl. 11.00, og hevði P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal lægsta tilboðið uppá kr. 1.085.745,00 u/mvg. Sí skjal nr. 2008-3944/18.

Fíggjarviðurskiti:
Áður játtað til projektering og uppmáting er kr. 400.000 og er tað av íløgujáttanini 2010/2011, ið er uml. 7,4 mió. kr.
Ískoyti: Málið varð sent til kunningar í heilsu og umhvørvisnevndin, smb. teldubrævið frá umsitingini 11. mars 2011.

Tilmæli:
B□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal og at játta pening til verkætlanina sambært skjali nr. 2011-1045/1 og beina málið um fíggjarnevndina í b□ráðið.

Tekniska nevnd 28. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at taka av tilboðnum frá P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal á kr. 1.085.745,00 og beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 1.410.000,00 av íløgum í kloakkir konto 6875.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá P/F Plan v/Jóhannes Hellisdal.

113/11 **2011-1092 JJ**

Fíggjarlig viðurskifti hjá plan- og rakstrardeildini fyri árið 2010 og 2011.

Lýsing av málinum - samandráttur:
Plan- og rakstrardeildin umsitur fylgjandi deildir:

- §4: 4144 Skúlabarnaflutningur,
- §6: 6810 Kloakkir o.a.
  6811 Áír, yvirflatuvatn og veitir
  8110 Vegir o.a.
  8111 Reinhald,
  8112 Asfalt
  8113 Ferðsla
  8114 Kavarudding.
- §7: 7510 Bussleiðin

7610 Parkeringsskipanin.

Samlaða játtanin í 2010 var álj. kr. 58.735.000 og í ár kr. 56.445.000.

Einans tvær deildir høvdu eitt undirskot í 2010, størri enn ásettu 5% sambært galdandi játtanarreglum. Hesar eru:

- §6: 8114 Kavarudding, sum fekk flutt í 2010 kr. 1.200.000 frá deild 8112 Asfalt og gav hóast tað, eitt hall í fjør. Sí j. nr.: 2011-1092/2, ið vísir status fyri 2010.
- §7: 7610 Parkeringsskipanin, ið gav eitt hall. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2011-2770, sum hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd.

Av tí at ein n□ggj kontoskipan bleiv innførd í 2010 er b□tið av §6 deildunum ikki heilt, sum hon skal verða. Tað hevur ført við sær m.a. at neyðugt hevur verið at flyta upphæddir millum deildir. Sí j. nr.: 2011-1092/2.

Í sambandi við at kommunan hevur gjørt sáttmála um n□ggja bussleið, er játtanin hjá deild 4144 Skúlabarnaflutningur fyri tað mesta førd yvir á deild 7510 Bussleiðin, av tí at tann n□ggja bussleiðin kemur at røkja ein stóran part av skúlabarnaflutninginum. Millum annað tí eru hesar játtanir so nógv broyttar, at tað ikki gevur meining at samanbera tær við undanfarin ár.

Viðv. §6 deildum:
Samlaða játtanin til §6 rakstrardeildirna sum nevnt omanfyri er í 2011 kr. 1.090.000 minni enn í 2010.(víst verður til notat j. nr. 2011-1092/4)

Smb. fíggjardeildini verða øll úrslit frá 2010 framflutt til 2011. Tað vil viðføra, at §6 rakstrarjáttanirnar fyri 2011 verða á leið tær somu sum í fjør – tó við einum undantaki: deild 8114 Kavaruddingin, ið kemur at geva eitt hall annað ár á rað, vegna óvanliga nógvan kava.

Viðv. §7 deildum:
7610 Parkeringsskipanin hevur eitt stórt hall, av tí at tað var væntað eitt stórt yvirskot, ið ikki kom í 2010 og væntandi heldur ikki í 2011.

Verður tikið samanum fyri omanfyri standandi deildum innan §6 og §7 má staðfestast, at samlaði fíggjartørvurin fyri vantandi inntøkur á parkeringsskipanini, deild 7610 og ov stórum útreiðslum til kavarudding, deild 8114, fyri fíggjarárið 2010 og 2011, verður 2,5 mió. kr. (1,2 + 1,3 mió. kr.)

Tilmæli:
Við støði í avgerðini hjá fíggjarnevndini í sambandi við mál nr. 2011-2770 um parkeringsskipanina, har avgjørt varð í fíggjarnevndini, at umsitingin finnur írestandi játtan av øðrum rakstrardeildum innan tekniska økið, verður mælt til at taka undir við framlagda uppskotinum, j. nr 2011-1092 /3.

Tekniska nevnd 28. apríl 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at hækka játtanir á deild 6810 við kr. 100.000, deild 8111 við kr. 900.000, deild 8114 við kr. 1.300.000 og deild 7610 við kr. 1.200.000; og at lække deild 6811 við kr. 900.000, deild 8110 við kr. 400.000 og deild 8112 við kr. 1.300.000.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við tiilmælinum og at hækka játtanir á deild 6810 við kr. 100.000, deild 8111 við kr. 900.000, deild 8114 við kr. 1.300.000 og deild 7610 við kr. 1.200.000; og at lækka deild 6811 við kr. 900.000, deild 8110 við kr. 400.000 og deild 8112 við kr. 1.300.000 og deild 8113 við kr. 900.000.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt.

114/11 **<u>2011-0934/2 SG</u>**

<u>Oyggjaleikir í Føroyum í 2021</u>

Fyrstu oyggjaleikirnir vóru í 1985 á Isle of Man og hava síðani verið hildnir annaðhvørt ár. Leikirnir vóru í Føroyum í 1989. Oyggjaleikir, sum nú hava heitið NatWest Island Games, verða á Isle of Wight í ár, á Bermuda í 2013, Jersey í 2015 og væntandi á Gotlandi í 2017. Kappast verður í mesta lagi í 14 ítróttagreinum, og eru tær ikki tær somu hvørja ferð. Teir 25 limirnir í felagsskapinum atkvøða um ítróttagreinarnar.

Ítróttasamband Føroya fer at søkja um at verða vertur fyri oyggjaleikunum í 2021. Tórshavnar kommuna tekur undir við hesum, og er í tí sambandi sinnað at fara undir at útvega karmar og umstøður til kappingar í teimum ítróttagreinum, sum ikki hava nøktandi umstøður í løtuni, og sum krevjast, um Føroyar skulu vera vertir. Tað sn□r seg um ítróttagreinarnar golf, tennis og skjóting

- Tilmæli kemur til fundin.

Declaration from the City Council of Tórshavn regarding the Island Games 2021

The City Council of Tórshavn proudly declares full support to the Faroese Confederation of Sports and Faroese Islands Committee in their efforts to host the Island Games 2021 in the Faroe Islands and the city of Tórshavn.

The citizens of Tórshavn have good and glad memories of the Island Games held here in 1989. The Island Games 1989 were indeed a landmark for the development of sports as well as in organizing a large international event in the Faroe Islands.

Being the capital and centre of the Faroe Islands, Tórshavn welcomes the Island Games family once again. Tórshavn is already now able to provide venues of highest international standards in most Island Games sports.

The City Council of Tórshavn acknowledges the need for new venues for international competition in golf and shooting, and will therefore take a leading role together with partners and governmental authorities to ensure that Tórshavn also can provide these necessary venues well before the Island Games 2021.

The City Council is also confident that Tórshavn can provide accommodation for 2.500 participants or more in Island Games villages situated within 10 minutes drive to all the Island Games venues in Tórshavn.

The Island Games truly are a celebration of sports, culture and island fellowship. Therefore, the City Council of Tórshavn looks forward to a constructive and giving cooperation with the Faroese Confederation of Sports, the Faroese Islands Games Committee and the International Island Games Association, so that the Island Games 2021 in the Faroe Islands and in Tórshavn will be a memorable success.

Mentamálanevndin 27. apríl 2011: Samtykt at taka undir við fráboðanini og at beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt hesa orðing:

Declaration from the City Council of Tórshavn regarding the Island Games

The City Council of Tórshavn proudly declares full support to the Faroese Confederation of Sports and Faroese Islands Committee in their efforts to host the Island Games in the Faroe Islands and the city of Tórshavn.

The citizens of the Faroe Islandes have good and glad memories of the Island Games held here in 1989. The Island Games 1989 were indeed a landmark for the development of sports as well as in organizing a large international event in the Faroe Islands.

Being the capital and centre of the Faroe Islands, Tórshavn welcomes the Island Games family once again. Tórshavn is already now able to provide venues of highest international standards in most Island Games sports.

The City Council of Tórshavn acknowledges the need for new venues for international competition in golf and shooting, and will therefore take a leading role together with partners and governmental authorities to ensure that Tórshavn

also can provide these necessary venues in near future.

The City Council is also confident that Tórshavn can provide accommodation for 2.500 participants or more in Island Games villages situated within 10 minutes drive to all the Island Games venues in Tórshavn.

The Island Games truly are a celebration of sports, culture and island fellowship. Therefore, the City Council of Tórshavn looks forward to a constructive and giving cooperation with the Faroese Confederation of Sports, the Faroese Islands Games Committee and the International Island Games Association, so that the Island Games in the Faroe Islands and in Tórshavn will be a memorable success.

115/11 **2010-2007/36 SG**

Dagstovnurin í Hoyvik

Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja nýtt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

Fíggjarnevndin 14. apríl 2011: Kunnað varð um málið.

Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011: Tikið av skrá.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Umrøtt.

Ískoyti:
Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.

	Projektnr.	Upphædd
§ 3 Børn og ung		
Løgukarmur (frítíðarskúli)	-	1.000.000
FTS í Gula skúla	L31002	242.000
§ 5 Mentan og frítíð		
Musikkskúlin	L51002	3.800.000
Spælipláss í Grasagarði	L53001	150.000
Íløgukarmur (badmintonhøllin)	-	240.000
Tórsvøllur	L57008	4.538.000
Ítróttahøllin í Kollafirði	L57011	1.500.000
§ 6 Teknisk mál		
Íløgukarmur (fríðkan)	-	331.000
Kongabrúgvin	L62012	996.000
Vaglið	L62014	997.000
Frílendi til borgaran	L62015	217.000
Løgukarmur (kirkjugarðar)	-	1.000.000
Løgukarmur	-	396.000
Keyp og søla	-	1.500.000
§ 7 Kommunal virkir		
Útbúnaður á bátaøkinum	L74002	5.848.000
Í alt		**22.755.000**

Mentamálanevndin 18. mai 2011: Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla b□ráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

Løgukarmur (frítíðarskúli)	1.000.000
FTS í Gula skúla	242.000
Badmintonhøllin	240.000
Keyp og søla	1.500.000
Húsaumvæling	2.500.000
B&U økt virks (rakstur)	500.000

Fíggjarnevndin 24. mai 2011: Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla b□ráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

tkr.

3175	FTS, Løgukarmur	Lækking	-1.000
3175	FTS, Guli skúli	Lækking	-242
5775	Ítróttaranlegg løgukarmur	Lækking	-240
6175	Keyp og søla av fastari ogn	Lækking	-1.500
6110	Røkt av bygningum	Lækking	-8.518
3214	Børn og ung, Umvælingar o.a.	Lækking	-500
3175	Dagstovnurin í Hoyvík	Hækking	12.000

Býráðið 26. mai 2011: Tikið av skrá.

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ **26. mai 2011**	Blað nr.: **9083** Formansins merki:

FUNDUR LOKIN KL. 19:20

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

Jógvan Arge	Sjúrður Olsen	Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal	Halla Samuelsen	Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein	Vagnur Johannesen	Levi Mørk
Maria H. Olsen	Jákup Símun Simonsen	Jan Christiansen
	Heðin Mortensen	